## Føroyar hølvaðu Orkney av

Føroyska U15 landsliðið spældi mánadagin fyrsta dystin í Aberdeen International Football Festival. Dysturin var ímóti Orkney, og Føroyar vunnu heili 10-0

Helgi Samson úr KÍ skoraði fýra mál, Gilli Sørensen úr TB og Jógvan Rói Davidsen úr HB 2, Remi Langgaard úr NSÍ og Jógvan Ólavson úr HB hvør sítt.

U15 landsliðið spælir tveir dystir týsdagin. Annar er ímóti Dundee United, sum eisini vann stórt í dag, og hin er ímóti norska Tjensvoll, sum tapti stórt í gjár.

Eisini føroyska U17 landsliðið hevur spælt dyst í Aberdeen International Football Festival. Dysturin var ímóti einum liði úr Ghana, og føroyska liðið tapti 1-0. U17 landsliðið spælir í dag ímóti vertunum úr Aberdeen.

## Chelsea fjepparar velja sær italiumenn

Undir heitinum "Fancy a bit of Italian?", letur sjónvarpsrásin hjá enska stórfelagnum Chelsea sínar fjepparar í kvøld koma til orðanna um hvørjar leikarar felagið skal keypa í neyðstøddu italsku fótbóltsfeløgunum Fiortina, Juventus og Lazio.

Sjónvarpsrásin hevur slagorðið "The show Roman Abramovich watches", og tað sigst, at russiski ríkmaðurin hyggur at hvørji sending, so tí kunnu ynskini hjá fjepparunum, um tey eru nóg væl grundgivin, lætt gerast veruleiki, tí pengapungurin hjá Chelsea ánaranum er so tjúkkur, at eingin leikari í heiminum er ov dýrur, um Abramovich veruliga ynskir at keypa hann.

# Knørrur sleppur ikki undan FM

**Eftir sigurin í Sandavági er setningurin hjá Knørri at megna at rógva teinin upp á 900 metrar, sum ólavsøkumálið fevnir um**

8-MANNAFØR

*Jóannes Hansen*




*Knørrur vann róðurin hjá 8-mannaførunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað var stórur fagnaður, tá ið Knørrur damlaði á dráttin, eftir glæsiliga sigurin á Ørvi, Argjabátinum og Nevinum Reyða. Dreingirnir á Jallinum saman við øðrum viðhaldsfólkum syftu bátin upp á land og bóru hann upp á pláss.

FM heitið er ikki tryggjað hundrað prosent, men tað var ikki at undrast á, at deymurin av FM og gulli hekk uppi í Knørra monnunum og viðhaldsfólkunum hjá teimum. Sigurin bar við sær, at tað eru fimm stig frá Knørri og aftur til Ørv. Bara fýra bátar hava luttikið í hesi kappingini, og tí er setningurin hjá Knørri at koma á mál á Ólavsøku, so verður hann meistari.

Um Knørrur rør soleiðis, sum hann gjørdi á Vestanstevnu, so verður hann meistari við manér, og tað vil siga við sigri á Ólavsøku:

– Tað gekk framúr hjá okkum. Vit fingu góðan start, og lunnaróðurin gekk fínt, var viðmerkingin hjá fegnu Knørra monnunum, tá ið teir aftur høvdu fingið fast undir føti.

### Knørrur stýrdi róðrinum

Aftur hesa ferð var tað Nevið Reyða, sum legði bragdligast fyri, men tað var skjótt, at Knørrur var fremstur, og síðani var tað eingin ivi um, hvør fór at vinna. Knørrur stýrdi róðrinum, og hinir bátarnir megnaðu ongantíð at bjóða honum av, eftir at hann hevði vunnið oddastøðuna.

Heldur var tað ein spurningur um, hvør fór at vinna kappingina um næstfremsta plássið. Sammett við undanfarnu ferðirnar var tað eitt sindur óvæntað, at tað var Argjabáturin, sum lá á Ørvi í tí kappingini. Munurin var stórur skutur. Eftir góða startspurtin og góða støðu ein part av miðróðrinum datt Nevið Reyða aftur á fjórða og aftasta plássið.

Knørrur hevur tríggjar ferðir áður verið føroyameistari – í 1985, 1989 og í 1990.

Úrslitið á Vestanstevnu ber við sær, at tað undan Ólavsøkuni er avgjørt, at Ørvur fer at vinna silvur og at Argjabáturin fer at vinna bronsu í FM kappingini. Tað hevur verið tosað um, at Nevið Reyða skuldi fara at gera ein vørr í síðstu róðrunum. Higartil hevur tað ikki eydnast, men sjálvandi hevði sigur á Ólavsøku bøtt heilt nógv um!

**Úrslit 8 mannafør menn**

| | |
|---|---|
| 1 Knørrur | 04:31.08 |
| 2 Argjabáturin | 04:34.02 |
| 3 Ørvur | 04:35.04 |
| 4 Nevið Reyða | 04:38.11 |

# Sølmundur sólaði sær til FM

**Á Sundabátinum ásannaðu teir, at teir høvdu tapt fyri verdugum meistara, og bæði FM vinnararnir og avbjóðararnir góvu leygardagin lyfti um, at tað verður hørð kapping á Ólavsøku**

6-MANNAFØR MENN

*Jóannes Hansen*

Kappróðrarfelagið NSÍ eigur besta 6-mannafarið við monnum. Tað varð neglt rimmar fast á Vestanstevnu, tá ið Sølmundur við sannførandi avriki og sigri tryggjaði sær sjey stig og harvið meistaraheitið.

– Vit fingu góðan start, og í miðróðrinum gekk tað framúr væl hjá okkum. Vit kendu tað soleiðis, at munurin aftur til hinar øktist eina góða løtu, og tá ið vit fóru undir endaspurtin, kendu vit okkum ikki serliga hóttar. Á síðstu metrunum gekk Sundabáturin skjótt inn á okkum, men so tóku vit orduliga á aftur, og tað var nóg mikið til at vinna róðurin og harvið at tryggja okkum FM.

Hetta var skjóta og beinrakna niðurstøðan hjá teimum umborð á Sølmundi, tá ið stríðið var lokið, og teir bæði høvdu fingið í posa og sekk.

– Vit fegnast um FM heitið, men vit ætla okkum at vinna á Ólavsøku eisini. Hetta vóru skjótu framtíðar ætlanirnar hjá góðu manningini. Um tað fara at verða hesir garparnir, sum fara at loysa av umborð á Eysturoyingi, tá ið teir, sum hava mannað gula 10-mannafarið seinastu árini, fara at leggja árarnar inn, segði henda søgan einki um.




*Umborð á Sølmundi hava teir ikki dult fyri, at tað er ein av manningini á Eysturoyingi, sum hevur lagt teimum lag á, og sum teir fegnir vilja luta sigurin við*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Rosenblad við í spælinum

Umborð á Sølmundi hava teir ikki dult fyri, at tað er ein av manningini á Eysturoyingi, sum hevur lagt teimum lag á, og sum teir fegnir vilja luta sigurin við.

– Jón Rosenblad hevur lagt ætlanirnar fyri venjingini, og hann hevur veg-leitt okkum sera væl.

Sundabáturin hevur alt árið verið størsti kappingarneytin hjá Sølmundi. Tað gekk leingi illa hjá Sundabátinum í Sandavági. Eitt skifti var hann umframt Sølmund eisini aftanfyri Jarnbard og kanska eisini onkran annan. Men í endaspurtinum vístu teir á Sundabátinum, at teir eru verdugir silvur vinnarar í FM kappingini.

– Vit royndu tað, sum vit kundu, og í endaspurtinum gekk tað væl, men Sølmundur róði betri enn vit, og harvið hevði hann sigurin væl og virðiliga uppibornan. Men vit ætla at taka teir á Ólavsøku, var ynski dreymurin, sum teir á Sundabátinum ætla at gera til veruleika annan fríggjadag.

**Úrslit - 6 mannafør menn**

| | |
|---|---|
| 1 Sølmundur | 04:42.04 |
| 2 Sundabáturin | 04:42.19 |
| 3 Jarnbardur | 04:46.10 |
| 4 Hósvíkingur | 04:48.16 |
| 5 Smyril | 04:51.01 |
| 6 Gongurólvur | 04:51.12 |
| 7 Páll Fangi | 04:52.12 |
| 8 Lómur | 04:54.20 |
| 9 Víkingur | 04:54.24 |
| 10 Kollfriðingur | 04:58.19 |
| 11 Árnfjarðarbáturin | 05:01.23 |